# Læraravegleiðing: Ringrásarbygging

**Evni**
- Ringrásarbygging

**Mælt tíðarlongd:**
- 25 min.

## Introskeið

Undirvísingartilfar til at fremja burðardygd og endurnýtslu í byggivinnuni

## Innleiðsla

Í tilfarinum er eitt sjónband gjørt, sum vísir lærlinginum ringrásarbygging, niðurtøku og endurnýtslu. Endamálið við sjónbandið er at geva næminginum fatan av hugtakinum ringrásarbygging og hvat tað inniber innan byggivinnuna.

## Fyrireiking

Lærarin skal:
- Leggja tilfarið/gongdina fyri
- Byrja við at vísa sjónbandið fyri næmingarnir
- Hjálpa lærlinginum við ráðgeving til at svara uppgávubløðunum.
- Stýra vitanardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at leggja síni svar fram til uppgávurnar og koma við spurningum, viðmerkingum og forkláringum.
- Hjálpa við at nágreina svari hjá luttakaranum og skriva tey sum felags floksviðmerking.

Luttakarin skal:
- Kunna síggja og hoyra sjónbandið
- Kunna greiða frá (deila sína vitan) við at svara spurningunum í uppgávuni
- Kunna lurta eftir svarum hjá øðrum luttakarum
- Kunna tekna/skriva viðmerkingar, sum hjálpa teimum at minnast sína vitan og sínar meiningar.

Skipan:
- Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini sjálvstøðugt ella í smærri bólkum.

# Læraravegleiðing: Ringrásarbygging

## Læringarmál

<u>Yvirskipað</u>

- Næmingurin hevur vitan um ymisk hugtøk innan ringrásarbygging
- Næmingurin kann meta um munin millum endurnýtslu og endurvinning
- Næmingurin kann lýsa fyrimunirnar við at endurnýta beinleiðis í mun til at endurvinna.
- Næmingurin hevur vitan um, hvørji byggitilfar vanliga stava frá eini niðurtøku.

<u>Úrveljandi niðurtøka:</u>

- Næmingurin kennir munin millum niðurtøku og úrveljandi niðurtøku.
- Næmingurin fær fatan av, hvussu man í verki fremur úrveljandi niðurtøku.
- Næmingurin kann greiða frá, hví úrveljandi niðurtøka gevur meining við atliti til ringrásarbygging.

## Innihald og endamál

Luttakarin skal arbeiða við hugtøkunum ringrásarbygging, úrveljandi niðurbrot, endurvinning og endurnýtslu.

<u>Uppskot til undirvísingargongd:</u>

Lærarin byrjar undirvísingina og leggur tilfarið/gongdina fram: Innleiðing/endurinnleiðing til heimasíðuna.

<u>Sjónband (5 min)</u>

- Næmingurin hyggur at sjónbandið

<u>Quiz til sjónbandið (10 min)</u>

- Eftir at næmingarnir hava sæð sjónbandið, skulu teir svara spurningum, ið eru tengdir at evninum. Tað eru sjey spurningar í quizini:

1. Hví er tað týdningarmikið at endurnýta byggitilfar í byggivinnuni?
2. Hvørjar avbjóðingar kunnu vera við at brúka endurnýtt tilfar?
3. Hvat er munurin millum endurvinning og endurnýtslu av tilfari?Hví er tað betri at endurnýta byggitilfar enn at endurvinna tey?
4. Hvat snýr ringrásarbygging um?Hvat er úrveljandi niðurtøka?
5. Hvar kann man millum annað keypa endurnýtt tilfar?

# Læraravegleiðing: Ringrásarbygging

<u>Samandráttur í felag (10 min)</u>

- Lærarin stýrir einari samanumtøku av nýggju vitanini, sum næmingarnir hava fingið. Brúka sjónbandið og teir sjey spurningarnar sum útgangsstøði og kjakast um, hvat eru røttu svarini.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaranum til at fata og hugleiða um innihaldið í sjónbandið og leita eftir vitan um evnið gevur møguleika at geva meira ella minni framkomin boð uppí vitanardeilingina.

## Feedback og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beinleiðis feedback frá læraranum, tá lærarin hjálpir við at forklára grundgevingina, áðrenn íkasti verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at "góð" boð verða virðismett og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv boð verða umarbeidd í samverkan millum læraran og luttakaran, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.